## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og fyribils turt og sólglottar, men um kvøldið regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og stundum regn. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og útsynningi og ælingur. Hitin millum 6 og 10 stig.

# Fongur

**Tað liggur í føroyinginum at fáa. Altíð at fáa nógv og helst vera bestur. Í nøgd. Tað er ikki fyrr enn seinnu árini, nú vit í grundini eru tvingaðir til tað, at vit eru farnir at hugsa um, hvat fæst fyri alt tað, vit fiska**

*Teir fegnast um fongin. Og kunnu eisini fegnast um, at hann er so væl hagreiddur, at gravgangur er eftir at sleppa at keypa hann*
*Mynd: Edvard Joensen*




**VEIÐIHUGUR**
*Edvard Joensen*

Altíð hevur tað ligið i føroyinginum at fingið. Fingið nógv. Og lítið hevur gjøgnum tíðirnar veirð hugsað um, hvussu tilstandurin var, tá tað, drigið varð úr sjónum, varð lagt upp á land.

Ikki eru so øgiliga nógv ár síðan, at men stóðu á bryggjunum og flaktu kavrotnar brosmurúgvur, sum lagdar vórðu í salt og seldar sum mannaføði. Hóast veruleikin var, at tað illa varð brúkandi at geva kettuni.

Men her er tíbetur vend komin í, og menn eru farnir at hugsa um góðsku og at fáa sum mest fyri tað, fiskað verður.

Væl kann tað vera, at prísskipanin, sum fyrr var, gjørdi støðuna, og at uppboðssølurnar hava broytt hugburðin rætta vegin. Og so er tað jú í lagi.

Men mangan man hava verið bannað yvir hesi fólkini, sum av og á komu framvið og vístu á ymiskt, sum ikki var, sum fyriskrivað var. Sumt skuldi vaskast, og sumt skuldi flytast.

Og hjálpt hevur tað, eins og tey mótmælini, komin eru móti gridnadrápinum, hava.

Men framvegis vilja vit hava nógv, tá vit veiða. At vit so samstundis fara so væl við tí, at eisini fæst nógv fyri tað í prísi, er bara at fegnast um.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷12 |
| Nuuk | ÷8 |
| Qaqortoq | ÷2 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | 1 |
| Halifax | ÷1 |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 10 |
| Tromsø | ÷2 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | ÷3 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 10 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 17 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 16 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 10 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 2 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 22 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 970 hPa sunnan fyri Ísland fer í útnyrðing og grynnist. Brúgvalagið haðani til Føroya fer norðureftir.




Eitt djúpt lágtrýst, 962 hPa sunnan fyri Hvarvið stendur mestsum í stað, meðan brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar leygarkvøldið.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 27/11 kl. 06[00]– 28/11 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 9,2°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 7,0 mm – mált frá 27/10 kl. 06[00]– 28/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 165,1 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

27. nov.: Seinna kvarter
2. des.: Mánin næstur jørðini
4. des.: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29. nov | 02.02 | 14.25 | 01.02 | 13.25 | 01.17 | 13.40 | 04.02 | 16.25 | 05.02 | 17.25 | 00.17 | 12.40 | 11.40 | — | 02.17 | 14.40 | 03.17 | 15.40 | 01.47 | 14.10 | 03.02 | 15.25 |
| 30. nov | 02.46 | 15.08 | 01.46 | 14.08 | 02.01 | 14.23 | 04.46 | 17.08 | 05.46 | 18.08 | 01.01 | 13.23 | 00.01 | 12.23 | 03.01 | 15.23 | 04.01 | 16.23 | 02.31 | 14.53 | 03.46 | 16.08 |
| 1. des | 03.31 | 15.53 | 02.31 | 14.53 | 02.46 | 15.08 | 05.31 | 17.53 | 06.31 | 18.53 | 01.46 | 14.08 | 00.46 | 13.08 | 03.46 | 16.08 | 04.46 | 17.08 | 03.16 | 15.38 | 04.31 | 16.53 |
| 2. des. | 04.17 | 16.42 | 03.17 | 15.42 | 03.32 | 15.57 | 06.17 | 18.42 | 07.17 | 19.42 | 02.32 | 14.57 | 01.32 | 13.57 | 04.32 | 16.57 | 05.32 | 17.57 | 04.02 | 16.27 | 05.17 | 17.42 |